# Sunnudagur 10. juli

RANDI KÚRBERG leggur nærum tveir metrar afturat tí føroyska metinum í spjótkasti, men tað røkkur ikki til meira enn eitt áttanda pláss.

SAM VANG roynir seg á sínum føðingardegi fyri fyrstu ferð nakrantíð í 3.000 metra forðarenning, men hann endar aftast.

Í 10.000 METRA renningini eru bæði Cecil Weihe og Guttorm Sørensen við. Cecil endar sum nummar 6, meðan Guttorm, sum fær skaða undir renningini, endar sum nummar 8.

HEINI HÁTÚN kastar ikki sítt besta, tá ið hann varpar kúluna 12,65 metrar út.

FØROYSKU SÚKKLARARNIR kláraðu seg ikki serliga væl í einkultstartinum. Gunnar Dahl-Olsen hevur frægasta úrslitið og endar sum nummar 10. Føroyska liðið verður nummar 6.

SKJÚTTARNIR royna seg í tveimum ymiskum kappingum – sporting og trapp – men bæði føroysku liðini enda aftarliga.

KVINNULANDSLIÐIÐ í fótbólti leggur fyri við einum 6-0 sigri á Isle of Man. Sigurin er tryggur, hóast venjarin sparir onkrar av lyklaspælarunum til dystirnar ímóti Álandi og Bermuda næstu dagarnar.

BÆÐI LANDSLIÐINI í flogbólti vinna sínar fyrstu dystir. Kvinnurnar vinna 3-0 á Orkney, og menninir vinna trupla dystin ímóti Gotlandi 3-1.

LIÐKAPPINGARNAR í borðtennis og badminton byrja. Í báðum førum er talan um innleiðandi bólkar við fleiri dystum. Avgerandi dystirnir verða týsdagin.

LØGMAÐUR Jóannes Eidesgaard er við til Oyggjaleikirnar í Hetlandi. Hann er hjástaddur undir setanini og fylgir fram til týsdagin teimum føroysku ítróttarfólkunum.




*Christian Guttesen má hyggja, meðan hinir súkklararnir strúka framvið. Hann gavst í einkultstartinum orsaka av skaða*



*Marin í Dali fær nakrar vegleiðingar frá venjaranum Preben Larsen*



*Millum áskoðararnar til súkklukappingina var hesin*



*Føroyingar vinna trupla flogbóltsdystin ímóti Gotlandi, og so kunnu Bárður B. Mikkelsen fegnast um tað*



*Hóast tað kundi sæð soleiðis út, so snáva føroyku fótbóltskvinnurnar ikki. Tær vinna trygt á Isle of Man í fyrsta dystinum*



*Herborg á Mýrini er nýggjur liðformaður á føroyska kvinnulandsliðnum í flogbólti*